INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

26. oktober 2012
Mál: 12/00119-21
Tygara skriv:
Málsviðgerð: GMN

Rundskriv

um

heilsuligar treytir fyri útgávu, endurnýggjan ella varðveitslu av koyrikorti

Akstovan hevur í samráð við Landslæknan ásett hesar leiðreglur fyri viðgerðini av málum um útgávu, endurnýggjan ella varðveitslu av koyrikorti fyri at gera av, um umsøkjari lýkur heilsuligu krøvini.

Leiðreglurnar eru settar upp í samsvari við uppsetingina av læknaváttan til koyrikort og fylgja ásetingunum í fylgiskjali 2 um minstakrøv viðvíkjandi kropsligum og sálarligum førleika at koyra motordrivið akfar, sum koyrikort krevst til, í kunngerð nr. 112 frá 29. september 2005 um koyrikort og koyrifrálæru við seinni broytingum.

Førarar eru býttir í tveir flokkar:

Flokkur 1: Førarar av akførum í bólkunum A, B, B/E og førarar av traktori/motoramboði.

Flokkur 2: Førarar av akførum í bólkunum C, C/E, D og D/E og harafturat førarar av akførum í bólkunum B og D, sum verða nýtt til vinnuligan fólkaflutning, eins og førarar, sum biðja um útgávu, endurnýggjan ella varðveitslu av koyrikorti við átekning um góðkenning sum koyrilærari.

Fyri handhavar av koyrikorti til vinnuligan fólkaflutning til bólk B og koyrikort við átekning um góðkenning sum koyrilærari til bólkarnar A ella B, útgivið áðrenn 1. januar 2006, galda harumframt ásetingarnar í hesum skjali fyri førarar í flokki 1 í sambandi við umsókn um endurnýggjan av slíkum koyrikorti.

Framløga fyri Landslæknanum og/ella Sundhedsstyrelsen (Heilsustýrið í Danmark) verður gjørd fyri fáa eina læknaliga meting av, um koyrikort kann verða útgivið, endurnýggjað ella varðveitt og eina meting av, um hetta eigur at verða við serligum fylgistreytum. Framløga verður gjørd við, at málið fyrst verður sent Landslæknanum.

Vegleiðandi heilsulig koyriroynd verður hildin fyri at meta um, og til hvørjar fylgitreytir, koyrikort kann verða útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, og eina meting av, hvussu akfarið skal verða innrættað.

Postboks 159 · 110 Tórshavn · Tlf 306800 · faks 306885 · imr@imr.fo · www.imr.fo

Útgáva, endurnýggjan ella varðveitsla av koyrikorti kann verða gjørd í samsvari við tær fylgitreytir, sum Landslæknin og/ella Sundhedsstyrelsen mæla til, undir hesum treytir um møguliga serstaka tíðaravmarking, sum í øllum førum ikki má vera longri, enn tær tíðarfreistir, sum hesar leiðreglur vísa.

Í sambandi við málsviðgerð í samsvari við hesar leiðreglur, eiga skjølini í undanfarnum málum, har koyrikort er útgivið, endurnýggjað ella noktað, í tann mun, tað er møguligt, at vera fingin til vega. Skjølini eiga harafturat at verða send við í førum, har málið verður lagt fram fyri Sundhedsstyrelsen, Landslæknan ella onnur.

A. Sjónin

Við avgerð skal dentur leggjast á sjónstyrki, sjónvídd og skygni í skýming, viðkvæmi fyri blindni í myrkri, viðkvæmi við møti (kontrast), dupultsjón og sjónvirkni, herundir um sjúka í eygunum er í menning. Linsa, løgd inn í eygað, verður ikki at skilja sum rættleiðandi brillur ella kontaktlinsur í hesum skjali.

Við læknakanning	Førara-flokkur	Heilsuligir upplýsingar og treytir fyri útgávu, endurnýggjan ella varðveitslu av koyrikorti	Longsta tíðar-avmarking	Framlagt fyri
1. Sjónstyrki	1	Koyrikort kann vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, um umsøkjarin/førarin hevur eina sjónstyrki, sum í minsta lagi er 0,5 (6/12), mátað á báðum eygum samstundis.[1)] Er markvirðið á 0,5 rokkið við nýtslu av brillum ella kontaktlinsum, verður koyrikort útgivið, endurnýggjað ella varðveitt við treyt um, at vanliga nýtt sjónrættleiðing, verður nýtt, meðan koyrt verður. Fyri umsøkjarar/førarar av akførum í bólki A, har sjónstyrkin á tí eina eyganum er minni enn 0,25 (6/24), verður koyrikort útgivið, endurnýggjað ella varðveitt við treyt um nýtslu av verndarbrillum (møguliga rættleiðandi verndarbrillum) meðan koyrt verður.[2)]		
	2	Koyrikort kann vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, um umsøkjarin/førarin hevur eina sjónstyrki, sum í minsta lagi er 0,8 (6/7,5) á tí betra eyganum og í minsta lagi 0,1 (6/60) á tí veikara eyganum. Eru markvirðini á 0,8 og 0,1 rokkin		

		við nýtslu av brillum ella kontaktlinsum, verður koyrikort útgivið, endurnýggjað ella varðveitt við treyt um, at vanlig sjónrættleiðing verður nýtt, meðan koyrt verður. Rættleiðing av sjónini við nýtslu av brillum, má ikki vera hægri enn plus átta dioptriir og eigur at kunna tolast væl.		
2. Sjónvídd	1	Koyrikort kann vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, um umsøkjarans/førarans sjónvídd á báðum eygum í minsta lagi er 120° í vatnrættari flatu og sjónvinkulin í minsta lagi er 50° til vinstru og høgru og 20° í rætningi uppeftir og niðureftir, mett við Donders ella við øðrum hættum. Tað má ikki vera útrás innan ein radius uppá 20° frá meginsjónvíddini.		Landslæknan og/ella Sundhedsstyrelsen
	2	Koyrikort kann vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, um umsøkjarans/førarans sjónvídd á báðum eygum í minsta lagi er 160° í vatnrættari flatu, og sjónvinkulin í minsta lagi er 70° til vinstru og høgru, og 30° í rætningi uppeftir og niðureftir, mett við Donders ella við øðrum hættum. Tað má ikki vera útrás innan ein radius uppá 30° frá meginsjónvíddini. Um tað bert er sjónvídd á einum eyga, skal málið leggjast fyri Landslæknan og/ella Sundhedsstyrelsen.		
3. Viðkvæmi við møti (kontrast) og blindni í myrkri	1	Eru upplýsingar um, at umsøkjarin/førarin líður av viðkvæmi við møti og/ella økt viðkvæmi fyri blindni í myrkri, kann koyrikort bert vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt í sambandi við læknaliga meting, grundað á eina kanning hjá serlækna í eygnasjúkum.		Landslæknan og/ella Sundhedsstyrelsen
	2	Koyrikort kann ikki vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, um		

		førarin/umsøkjarin er skerdur av viðkvæmi við møti og/ella øktum viðkvæmi við blindni í myrkri.		
4. Eygnasjúkur	1 + 2	Eru upplýsingar um, at umsøkjarin/førarin hevur sjúku í eygunum, sum er í menning, kann koyrikort bert vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt í sambandi við ummæli frá egnum lækna ella serlækna í eygnasjúkum og við treyt um einsæris ásetta tíðaravmarking.		Landslæknan og/ella Sundhedsstyrelsen
5. Blindni[3)] (eitt eyga)	1	Koyrikort kann vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, um umsøkjarin/førarin hevur eina sjónstyrki, sum í minsta lagi er 0,5 (6/12) á síggjandi eyganum, møguliga við rættleiðandi brillum/kontaktlinsum og eina sjónvídd á síggjandi eyganum, sum lýkur krøvini í 2. pkt. Er markvirðið á 0,5 rokkið við nýtslu av brillum ella kontaktlinsum, verður koyrikort útgivið, endurnýggjað ella varðveitt við treyt um, at vanlig sjónrættleiðing verður nýtt, meðan koyrt verður. Fyri førarar av akførum í bólki A, verður koyrikort útgivið, endurnýggjað ella varðveitt við treyt um nýtslu av verndarbrillum (møguliga rættleiðandi verndarbrillur) meðan koyrt verður.[4)]		
	2	Koyrikort kann ikki vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, um umsøkjarin/førarin er blindur á øðrum eyganum.		
6. Dupultsjón (diplopi)	1	Koyrikort kann vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, um umsøkjarin/førarin hevur eina sjónstyrki, sum í minsta lagi er 0,5 (6/12) á tí betra eyganum og sjónvíddin á hesum eyganum lýkur krøvini í nr. 2. Koyrikort verður útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, við treyt		

		um, at eygnaklaffur ella kám linsa verður nýtt á tí verra eyganum, meðan koyrt verður. Fyri umsøkjarar/førarar av akførum í bólki A, verður koyrikort útgivið, endurnýggjað ella varðveitt við treyt um nýtslu av verndarbrillum (møguliga rættleiðandi verndarbrillur) meðan koyrt verður.[4)] Er markvirði á 0,5 rokkið við nýtslu av brillum ella kontaktlinsum, verður koyrikort útgivið, endurnýggjað ella varðveitt við treyt um, at vanlig sjónrættleiðing verður nýtt, meðan koyrt verður.		
	2	Koyrikort kann ikki vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, um umsøkjarin/førarin hevur dupultsjón.		
7. Náttarblindni	1 + 2	Koyrikort kann vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, um umsøkjarin/førarin góðtekur, at koyrikort verður útgivið við teirri treyt, at koyring bert kann fara fram í dagtímunum (t.e.. frá sólarrisi til sólsetur). Um so er, at umsøkjarin ikki góðtekur hesa treyt, verður verkliga koyriroyndin/vegleiðandi heilsuliga koyriroyndin hildin eftir sólsetur: - Stendur umsøkjari/førari koyriroyndina / vegleiðandi heilsuligu koyriroyndina, kann koyrikort vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt. - Stendur umsøkjari/førari ikki koyriroyndina orsakað av náttarblindni, ella verður vegleiðandi heilsuliga koyriroyndin ikki gjøgnumførd við nøktandi úrsliti, orsakað av náttarblindni, verður koyrikort útgivið, endurnýggjað ella varðveitt við tí treyt, at koyring bert kann fara fram í dagtímunum.		

1) Henda sjónstyrki (felagssjónin) stendur á síðu 2, pkt. A 1, í læknaváttanini, í teigunum nevndir "Bæði eygu samstundis".
2) Kravið um nýtslu av verndarbrillum kann verða lokið við nýtslu av vanligum brillum, hvørs lodrætta mát íroknað stell, í minsta lagi er 4,5 cm.
3) Við blindni verður skilt ein sjónstyrki, sum við nýtslu av best møguligu sjónrætting er lægri enn 0,1 (6/60).
4) Kravið um nýtslu av verndarbrillum kann verða lokið við nýtslu av vanligum brillum, hvørs lodrætta mát íroknað stell, í minsta lagi er 4,5 cm.

B. Hoyrnin

Við avgerð skal dentur vera lagdur á møguleikar fyri ábótum við hoyritóli.

Við læknakanning	Førara-flokkur	Heilsuligir upplýsingar og treytir fyri útgávu, endurnýggjan ella varðveitslu av koyrikorti	Longsta tíðar-avmarking	Framlagt fyri
1. Skerd hoyrn	1 + 2	Stendur umsøkjari/førari hoyriroyndina við at nýta sítt vanliga hoyritól, verður koyrikort útgivið, endurnýggjað ella varðveitt við tí treyt, at hoyritól skal verða nýtt, meðan koyrt verður, ella, um umsøkjarin/førarin biður um tað, treytir sum ávístar, tá hoyriroynd ikki verður staðin. Stendur umsøkjari/førari ikki hoyriroyndina, verður koyrikort útgivið, endurnýggjað ella varðveitt við treyt um nýtslu av serliga tillagaðum speglum eftir ásetingum frá Akstovuni. Motorsúkkla skal verða útgjørd við síðuspeglum í báðum síðum. Onnur akfør skulu vera útgjørd við síðuspeglum uttan í báðum síðum eftir ásetingum frá Akstovuni. Speglið í førarans síðu, skal kunna stillast frá førarasetrinum. Speglið í mótsattu síðu skal vera kúput og skal kunna nýtast frá førarasetrinum gjøgnum tann partin av forrútinum, sum verður reingjørdur av viskarabløðunum, ella vera ásett á annan hóskandi hátt.		

C. Ferðugleiki

Koyrikort kann ikki vera útgivið hjá umsøkjarum ella førarum, sum bera sjúku ella avlaging í gongu- og handalimum, og sum ger tað hættisligt at lata viðkomandi koyra motordrivið akfar, sum koyrikort krevst til. Við avgerð, skal dentur vera lagdur á møguleikar fyri ábótum í staðin, eins og um talan er um sjúku, sum er í menning. Fyri umsøkjarar og førarar í flokki 2, skal tað við læknaligu metingina vera lagdur dentur á teir eyka vandar, ið eru tengdir at koyring við akførum, sum eru fevnd av hesum bólkum.

Við læknakanning	**Førara flokkur**	**Heilsuligir upplýsingar og treytir fyri útgávu, endurnýggjan ella varðveitslu av koyrikorti**	**Longsta tíðar-avmarking**	**Framlagt fyri**
1. Sjúka ella avlaging í gongu- og handalimum	1 + 2	Eru upplýsingar í málinum um støðuga sjúku ella sjúku í menning ella avlaging í gongu- og handalimum, kann koyrikort bert vera útgivið eftir ummæli frá egnum lækna ella serlækna í ortopedkirurgi, reumatologi ella aðrari viðkomandi sergrein.		Landslæk-nan og/ella Sundheds-styrelsen

D. Hjarta- og æðrasjúkur

Við avgerð skal dentur vera lagdur á, um umsøkjarin hevur sjúkur, sum kunnu føra til brádlig brek í hjarta- og blóðrenslinum og harvið ávirka eina brádliga broyting í heilavirkinum. Við avgerðina, skal dentur eisini leggjast á, um umsøkjarin er undir regluligum læknaeftirliti. Fyri umsøkjarar í flokki 2, skal tað við læknaligu metingina, verða lagdur dentur á teir eyka vandar, ið eru tengdir at koyring við akførum, sum eru fevnd av hesum bólkum.

Við læknakanning	**Førara flokkur**	**Heilsuligir upplýsingar og treytir fyri útgávu, endurnýggjan ella varðveitslu av koyrikorti**	**Longsta tíðar-avmarking**	**Framlagt fyri**
1. Hjarta- og æðrasjúkur	1 + 2	Koyrikort kann ikki vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt hjá umsøkjarum / førarum, sum líða av álvarssamari órógv í hjartaslagnum ella bringutaki (angina pectoris), ið koma fyri, tá tey eru í hvíld ella við sinnisrørslu. Um tað t.d. eru upplýsingar í málinum um, at umsøkjarin/førarin hevur ella hevur havt: - skert hjartavirkni ella hjartasvík, - ólag á blóðtrýstinum, sum hevur		Landslæk-nan og/ella Sundheds

		fört til eftirsjúkur ella aðrar sjúkur, sum kunnu vera til vanda fyri ferðslutrygdina, - hjartatilburð (-infarkt) tey seinastu 5 árini, ella - nýtir hjartakvikil (pacemaker), ICD, ella líknandi, ella - er skurðviðgjørdur í hjartanum, kann koyrikort bert vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt eftir ummæli frá serlækna í hjartasjúkum ella, um talan bert er um akfør í flokki 1, tá frá egnum lækna.		-styrelsen

E. Diabetes

Við avgerð skal dentur vera lagdur á, at umsøkjarin ella førarin er undir regluligum læknaeftirliti, at viðkomandi skilir vandan í sambandi við lágt blóðsukur (hypoglykæmi) og er førur fyri sjálvur at hava eftirlit við sjúkuni á ein nøktandi hátt, og um tað hava verið tilburðir við lágum blóðsukri (hypoglykæmiskir tilburðir ella insulintilburðir).

Umsøkjarar ella førarar, sum hava diabetes, ið er viðgjørt við tablettum ella insulini, skulu við útgávu, endurnýggjan ella varðveitslu av koyrikorti, fáa útflýggjað vegleiðing frá Akstovuni fyri førarar, sum hava sukursjúku.

Í uppsetingini niðanfyri, verður álvarsliga lágt blóðsukur (hypoglykæmi), allýst sum ein støða, ið krevur hjálp frá einum øðrum persóni. Ein persónur verður mettur at líða av afturvendandi álvarsliga lágum blóðsukri (recidiverandi hypoglykæmi), tá viðkomandi hevur havt meira enn ein tilburð av álvarsliga lágum blóðsukri, í einum tíðarskeiði uppá 12 mánaðir.

Við læknakanning	**Førara flokkur**	**Heilsuligir upplýsingar og treytir fyri útgávu, endurnýggjan ella varðveitslu av koyrikorti**	**Longsta tíðar-avmarking**	**Framlagt fyri**
1. Ikki viðgjørdur við heilivági	1 + 2	Koyrikort kann vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, um so er, at diabetessjúkan ikki verður viðgjørd við nøkrum slagi av heilivági.	5 ár	
2. Viðgerð við heilivági, sum IKKI hevur við sær vanda fyri lágum blóðsukri	1 + 2	Koyrikort kann ikki vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt hjá umsøkjarum/førarum, ið líða av afturvendandi álvarsliga lágum blóðsukri og/ella manglandi fatan av støðuni. Í førum, har umsøkjarin/førarin hevur	1) 5 ár 2) 3 ár	Landslæk-nan og/ella Sundheds-styrelsen

(hypoglykæmi)		verið úti fyri tilburði við álvarsliga lágum blóðsukri tey seinastu 2 árini, kann koyrikort bert vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt eftir ummæli frá egnum lækna ella serlækna í internum medisini við serligum kunnleika til diabetes.		
	1	Koyrikort kann vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, um umsøkjarin/førarin ikki hevur havt tilburð við álvarsliga lágum blóðsukri tey seinastu 2 árini.	5 ár	
	2	Koyrikort kann vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, eftir ummæli frá egnum lækna ella serlækna í internum medisini við serligum kunnleika til diabetes, um umsøkjarin/førarin ikki hevur havt tilburð við álvarsliga lágum blóðsukri tey seinastu 2 árini.	3 ár	Landslæknan og/ella Sundhedsstyrelsen
3. Viðgerð við heilivági, sum hevur vanda við sær fyri lágum blóðsukri (hypoglykæmi) (insulin v.m.)	1	a. Koyrikort kann ikki vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt hjá umsøkjarum/førarum, sum líða av afturvendandi álvarsliga lágum blóðsukri og/ella manglandi fatan av støðuni. b. Í førum, har umsøkjarin/førarin hevur havt álvarsliga lágt blóðsukur tey seinastu 2 árini, kann koyrikort bert verða útgivið, endurnýggjað ella varðveitt eftir ummæli frá egnum lækna ella serlækna í internum medisini við serligum kunnleika til diabetes. c. Um umsøkjarin ikki hevur havt tilburð við álvarsliga lágum blóðsukri tey seinastu 2 árini, kann koyrikort vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt.	3 ár 3 ár	Landslæknan og/ella Sundhedsstyrelsen
	2	Koyrikort kann bert vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt í heilt serligum førum eftir ummæli frá serlækna í internum medisini við serligum kunnleika til diabetes. Hesar fortreytir skulu í minsta lagi vera	3 ár	Landslæknan og/ella Sundhedsstyrelsen

		til staðar: - tað hevur ikki verið tilburður av álvarsliga lágum blóðsukri, seinasta 12 mánaðar skeiðið, - umsøkjarin/førarin kann fata og reagera uppá ávaringar um sjúkueyðkenni fyri nærverandi lágt blóðsukur, - umsøkjarin/førarin sannar við læknakanningina at vera førur fyri sjálvur at hava eftirlit við sjúkuni við regluligum mátingum av blóðsukurhæddini, í minsta lagi 2 ferðir dagliga og í tíðarbilum, tá viðkomandi skal koyra, - umsøkjarin/førarin sannar við læknakanningina at skilja vandan í sambandi við lágt blóðsukur, og - tað ikki eru aðrar eftirsjúkur(t.d. sjóviknan, nervasjúka ella kognitiv viknan) í sambandi við diabetessjúkuna, sum kann føra við sær týðandi váða fyri ferðslutrygdina. Við í metinginga, skal tað harafturat serliga vera tikið atlit at slagi av diabetes og koyrikotbólki, umframt hvussu støðug sjúkan er.		

F. Nervasjúkufrøðiligar sjúkur (epilepsi v.m.)

Við avgerð skal fyrilit vera tikið fyri møguleikunum at virka og útlitunum fyri nervasjúkufrøðiligum óvirkni, sum eru orsakað av sjúkum ella skurðviðgerð í meginnervalagnum ella í tí perifera nervalagnum, sum viðføra sansaligt ella funktiónsóvirkni, ella sum hava ávirkan á balansu og/ella koordinatión. Harafturat skal dentur vera lagdur á vandan fyri niðurfalssjúku (epilepsi) og øðrum álvarssomum tilvitskuóløgum.
Um so er, at koyrikort kann vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt hjá umsøkjarum ella førarum, sum eru í heilivágviðgerð fyri epilepsi, verður koyrikortið útgivið við treyt um, at umsøkjarin ella førarin skal vera undir læknaeftirliti og gera eftir boðum frá lækna, hvat viðvíkur at taka heilivág.
Í uppsetingini niðanfyri, verður epilepsi allýst sum ein støða, har ein persónur hevur havt tvey ella fleiri epileptisk herðindi í einum tíðarskeiði, sum er styttri enn 5 ár.
Um ikki annað er ásett niðanfyri, skal ummæli vera givið av einum serlækna í neurologi.

Við læknakanning	Førara flokkur	Heilsuligir upplýsingar og treytir fyri útgávu, endurnýggjan ella varðveitslu av koyrikorti	Longsta tíðar-avmarking	Framlagt fyri
1. Epilepsi	1	Koyrikort kann vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt eftir eina læknaliga meting, har dentur verður lagdur á sjúkuskap, kliniska gongd eins og viðgerð og úrslit av sjúkuni.		
		a. Tað hevur verið herðindi av epilepsi tey seinastu 2 árini. Hjá umsøkjarum/førarum, sum hava epilepsi, kann koyrikort bert vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt eftir 1 ár uttan fleiri tilburðir, tá viðkomandi hevur fingið fyribyrgjandi viðgerð móti epilepsi í minsta lagi í 6 mánaðir. Sama ger seg galdandi eftir skurðviðgerð móti epilepsi. Hjá umsøkjarum/førarum, sum ikki ynskja at taka ímóti fyribyrgjandi viðgerð móti epilepsi, kann koyrikort í fyrsta lagi vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt eftir 2 árum uttan fleiri tilburðir.	2 ár	Landslæknan og/ella Sundhedsstyrelsen
		b. Tað hevur ikki verið herðindi av epilepsi í meira enn 2 ár, men styttri enn 5 ár.	3 ár	
		c. Hava umsøkjarin/førarin bert havt herðindi, meðan sovið verður, ella bert havt herðindi, har tað er prófvfast, at herðindi hvørki hevur ávirkað vitið ella ført við sær skert funktiónsevni, kann koyrikort tó vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, tá egin lækni ella serlækni í nervasjúkufrøði vátta, at hetta mynstrið av herðindum hevur vart í einum tíðarskeiði, sum í minsta lagi er 2 ár. Um tað heilsufakliga er ráðiligt, kann koyrikort vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt við eini tíðaravmarking, sum er longri enn tær í litra a. og b. nevndu.		Landslæknan og/ella Sundhedsstyrelsen
	2	Hjá umsøkjarum ella førarum, sum hava epilepsi, kann koyrikort bert vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, eftir eitt tíðarskeið uttan herðindi, sum í minsta lagi er 10 ár, uttan fyribyrgjandi (antiepileptiskari) viðgerð móti epilepsi.		Landslæknan og/ella Sundhedsstyrelsen

		Umsøkjarin ella førarin skal skjalprógva, at hava verið til regluligt eftirlit hjá egnum lækna ella serlækna í nervasjúkufrøði. Ein nervasjúkufrøðilig serlæknakanning má ikki hava víst nakað slag av sjúkueyðkenni í heilanum (cerebral patologi), og eitt elektroencefalografi (EEG), má ikki hava víst nakað slag av epileptiskum virksemi. Í heilt serligum førum kann koyrikort vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt áðrenn hetta tíðarskeið, um so er, at serlig heilsufaklig viðurskifti tala fyri hesum.		
2. Einstakur epileptiskur tilburður	1	Hevur umsøkjari/førari havt eitt einstakt provokerað epileptiskt herðindi, orsakað av eini kendari provokerandi atvold, sum eftir øllum sannlíkindum ikki vil koma fyri undir koyring, kann koyrikort vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt eftir ummæli frá serlækna í nervasjúkufrøði ella nervaskurðfrøði. Í øðrum føri við einstakum epileptiskum herðindi, kann koyrikort vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, eftir eitt tíðarskeið, sum í minsta lagi er 6 mánaðir uttan herðindir og tá eftir ummæli frá serlækna í nervasjúkufrøði.		Landslæknan og/ella Sundhedsstyrelsen
	2	Hevur umsøkjari/førari havt eitt einstakt provokerað epileptiskt herðindi, orsakað av eini kendari provokerandi atvold, sum eftir øllum sannlíkindum ikki vil koma fyri undir koyring, kann koyrikort bert vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt eftir ummæli frá serlækna í nervasjúkufrøði ella nervaskurðfrøði. Til staðar skal vera eitt EEG og ein nervasjúkufrøðilig serlæknakanning. Hevur umsøkjari/førari havt eitt einstakt óprovokerað epileptiskt herðindi, kann		Landslæknan og/ella Sundhedsstyrelsen

		koyrikort vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, eftir eitt tíðarskeið uttan herðindi uppá 5 ár, uttan fyribyrgjandi (antiepileptiskari) viðgerð móti epilepsi og eftir ummæli frá serlækna í nervasjúkufrøði. Í heilt serligum førum kann koyrikort vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt hjá umsøkjarum ella førarum áðrenn hetta tíðarskeið, um so er, at serlig heilsufaklig viðurskifti tala fyri hesum.		
3. Álvarssom tilvitskuóløg	1 + 2	Við onnur álvarssom tilvitskuóløg enn tey í nr. 1 og 2 nevndu, kann koyrikort vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt eftir ummæli frá egnum lækna ella serlækna í viðkomandi sergrein, um vandan fyri endurtøku av herðindi undir koyring. Hjá umsøkjarum/førarum í flokki 2, kann vandin fyri endurtøku av herðindi undir koyring, í mesta lagi vera 2% um árið.		Landslæknan og/ella Sundhedsstyrelsen
4. Aðrar nervasjúkufrøðil igar sjúkur (arteriuvenøs avlagan, bygnaðarligur intracerebralur løstur v.m.)	1 + 2 ——— 2	Koyrikort kann bert vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt eftir eina læknaliga meting. ——— Hjá umsøkjarum/førarum, sum hava órógv, ið førir við sær øktan vanda fyri herðindi (t.d. arteriuvenøsa avlagan, intracerebrala bløðing ella onnur bygnaðarlig viðurskifti), óansæð um tað enn ikki hava verið herðindi, kann koyrikort bert vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt eftir ummæli frá serlækna í nervasjúkufrøði ella nervaskurðfrøði. Vandin fyri herðindi skal metast at vera í mesta lagi 2% um árið. Hjá umsøkjarum/førarum, sum hava ein		Landslæknan og/ella Sundhedsstyrelsen

		bygnaðarligan intracerebralan løst, sum hevur við sær øktan vanda fyri herðindi, kann koyrikort bert vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt, uttan fyribyrgjandi viðgerð móti epilepsi. Eftir ummæli frá serlækna í nervasjúkufrøði ella nervaskurðfrøði, skal vandin fyri epilepsi uttan fyrbyrgjandi (antiepileptiskari) viðgerð, metast at vera í mesta lagi 2% um árið.		

G. Sinnisligar sjúkur ella veikleikar

Hjá umsøkjarum í flokki 2, skal tað við læknaligu metingina vera tikið hóskandi fyrilit fyri teimum eyka vandum, ið eru tengdir at koyring við akførum, ið eru fevnd av hesum bólkum.

Við læknakanning	**Førara flokkur**	**Heilsuligir upplýsingar og treytir fyri útgávu, endurnýggjan ella varðveitslu av koyrikorti**	**Longsta tíðar-avmarking**	**Framlagt fyri**
1. Sinnisligar sjúkur	1 + 2	Um tað í málinum eru upplýsingar um, at umsøkjarin/førarin: - hevur ella hevur havt álvarssama sinnisliga sjúku, - hevur ella hevur havt ADHD, sum er viðgjørt ella er undir viðgerð við heilivági, - er sinnisliga menningartarnaður ella álvarsliga andliga seinmentur, - hevur álvarssama ellisviknan, eitt álvarsligt viknað dømievni, atferð ella tillagingarevni, sum er knýtt at persónmenskuni, ella - hevur ringan kognitivan funktiónsveikleika, kann koyrikort bert vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt eftir ummæli frá egnum lækna ella serlækna í viðkomandi sergrein.		Landslæk-nan og/ella Sundheds-styrelsen

H. Rúsdrekka, rúseitur og heilivágur

Við ta læknaligu metingina, skal dentur vera lagdur á, um nýtsla av rúsdrekka, dusandi evnum ella øðrum tilvitsávirkandi evnum, kunnu minka førleika umsøkjarans ella førarans at koyra

motordrivið akfar, sum koyrikort krevst til, herundir um tikna nøgdin er so stór, at hon kann ávirka koyringina skeiva vegin. Fyri umsøkjarar í flokki 2, skal tað við læknaligu metingina, vera tikið hóskandi fyrilit fyri teimum eyka vandum, ið eru tengdir at koyring við akførum, ið eru fevnd av hesum bólkum.

Við læknakanning	**Førara flokkur**	**Heilsuligir upplýsingar og treytir fyri útgávu, endurnýggjan ella varðveitslu av koyrikorti**	**Longsta tíðar-avmarking**	**Framlagt fyri**
1. Rúsdrekka	1 + 2	Um tað í málinum eru upplýsingar um, at umsøkjarin/førarin hevur verið tráur drykkjumaður (sjúkueyðkenni sum bundin av rúsdrekka), kann koyrikort bert vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt eftir ummæli frá egnum lækna ella serlækna í sálarsjúkum og í fyrsta lagi eftir eitt tíðarskeið, har viðkomandi hevur verið fráhaldandi.		Landslæk-nan og/ella Sundheds-styrelsen
2. Rúseitur (narkotika)	1 + 2	Um tað í málinum eru upplýsingar um, at umsøkjarin/førarin misnýtir dusandi ella onnur tilvitsávirkandi evni, ella regluliga tekur slík evni í ein slíkan mun, at tað kann ávirka førleikan at koyra motordrivið akfar, sum koyrikort krevst til, kann koyrikort bert vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt eftir ummæli frá egnum lækna ella serlækna í viðkomandi sergrein.		Landslæk-nan og/ella Sundheds-styrelsen
3. Heilivágur	1 + 2	Um tað í málinum eru upplýsingar um, at umsøkjarin/førarin regluliga tekur heilivág, ella samanseting av heilivági, í ein slíkan mun, at tað kann ávirka førleikan at koyra motordrivið akfar, sum koyrikort krevst til, kann koyrikort bert vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt eftir ummæli frá egnum lækna ella serlækna í viðkomandi sergrein.		Landslæk-nan og/ella Sundheds-styrelsen

I. Nýrasjúkur

Við avgerð og við ta læknaligu metingina, skal hóskandi fyrilit vera tikið fyri, um umsøkjarin ella førarin er undir regluligum læknaeftirliti.

Við læknakanning	Førara flokkur	Heilsuligir upplýsingar og treytir fyri útgávu, endurnýggjan ella varðveitslu av koyrikorti	Longsta tíðar-avmarking	Framlagt fyri
1. Skert nýrnavirkni	1 + 2	Um tað í málinum eru upplýsingar um, at umsøkjarin/førarin er sjúkur av álvarsomum nýrasvíkvirki, kann koyrikort bert vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt eftir ummæli frá egnum lækna ella serlækna í internum medisini.		Landslæk-nan og/ella Sundheds-styrelsen
	2	Um tað í málinum eru upplýsingar um, at umsøkjarin/førarin er sjúkur av álvarssomum nýrnasjúkum, ið ikki bøtast, so nýrnavirknið er skert, kann koyrikort bert vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt í serligum førum, og tá bert eftir ummæli frá egnum lækna ella serlækna í internum medisini.		Landslæk-nan og/ella Sundheds-styrelsen

J. Annað

Við avgerð og við ta læknaligu metingina, skal hóskandi fyrilit vera tikið fyri, um umsøkjarin ella førarin er undir regluligum læknaeftirliti, og harumframt um umsøkjarans heilsuliga støða kann minka førleikan at koyra akfar á tryggjandi hátt. Fyri umsøkjarar og førarar í flokki 2, skal tað við læknaligu metingina, vera tikið hóskandi fyrilit fyri teimum eyka vandum, ið eru tengdir at koyring við akførum, ið eru fevnd av hesum bólkum.

Við læknakanning	Førara flokkur	Heilsuligir upplýsingar og treytir fyri útgávu, endurnýggjan ella varðveitslu av koyrikorti	Longsta tíðar-avmarking	Framlagt fyri
	1 + 2	Um tað í málinum eru upplýsingar um, at umsøkjarin/førarin: - hevur fingið vevnaðarflutt yrkisgøgn ella vevnaðarísett eftirgjørd yrkisgøgn, ella - á annan hátt hevur aðra sjúku, enn tær í hesum skjali nevndu, sum		Landslæk-nan og/ella Sundheds-styrelsen

		kunnu ávirka førleikan skeiva vegin, at koyra motordrivið akfar, sum koyrikort krevst til, á tryggjandi hátt, kann koyrikort bert vera útgivið, endurnýggjað ella varðveitt eftir ummæli frá egnum lækna ella serlækna í viðkomandi sergrein.		

Innlendismálaráðið, 24. oktober 2012

Kári P. Højgaard
landsstýrismaður

/Rúni Joensen